## Vilt tú sleppa at uppliva eina altjóða CISV-legu?

CISV

## So er møguleikin her!

**Í ár hava vit tilboð til tykkara, sum í summar eru:**

| | |
|---|---|
| 11 ár | (Barnalega í 4 vikur) |
| 14 ár | (Summer Camp í 23 dagar) |
| 15 ár | (Summer Camp í 23 dagar) |
| 16-17 ár | (Ungleiðari á Barnalegu í 4 vikur) |
| 18-19 ár | (Seminar Camp í 3 vikur) |
| 21 ár og eldri | (leiðarar á barnalegum og Summer Camps) |

Ynskir tú at fáa eitt umsóknarblað, ella hevur tú spurningar hesum viðvíkjandi, kanst tú ringja á tlf. 22 29 20 (Annika) ella senda ein teldupost til cisv-fo@post.olivant.fo

Freistin at søkja er 24. februar 2006

**CISV - Altjóða Barnalegur**
**Boks 1127**
**FO – 110 Tórshavn**



Damfar
Livandi góðgæti

**GOYMSLUMAÐUR**

Til goymslu okkara sóknast vit eftir goymslumanni.

Arbeiðið umfatar alt vanligt goymsluarbeiði og at koyra vørur út til kundar okkara.
Tað er fyrimunur at tú hevur tað stóra koyrikortið.

Tú kann byrja beinanvegin, men vit bíða gjarna eftir tí rætta manninum.

Skrivlig umsókn skal sendast til okkum innan 17 februar 2006.

Blíðar heilsur

**DAMFAR P/F**
**Postboks 268**
**110 Tórshavn**



Lesið
Sosialin
-so eru tit við!


**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Stuðulsskipanin fyri vaksin*

# Sosialráðgevi

## til stuðulsskipanina fyri vaksin

Eitt starv sum sosialráðgevi á Stuðulsskipanini fyri vaksin, undir Heimarøktini og Serforsorgini, verður hervið lýst leyst.

Stuðulsskipanin fevnir um stuðul til umleið 114 heimabúgvandi brúkarar, svarandi til umleið 42 fulltíðarstørv.

Talan er um avloysarastarv í tíðarskeiðnum: 1. apríl – 31. desember 2006.

**Starvsuppgávur:**
- At ráðgeva og vegleiða
- Samskipa stuðulin, tá fleiri stovnar eru inni í myndini
- Viðgera nýggjar umsóknir
- Ráðgeva feløgum og stovnum
- Endurmeta ta hjálp, sum er veitt einum brúkara

**Vit søkja eftir einum starvsfólki, ið:**
- Hevur vitan og royndir innan sosiala øki
- Hevur áhuga at arbeiða við brekaðum
- Dugir at skapa positivt og virðiligt samband við brúkaran
- Dugir at arbeiða skipað og miðvíst
- Dámar at arbeiða bæði sjálvstøðugt og tvørfakliga
- Er sálarliga væl fyri og dámar avbjóðingar
- Er uppfinningarsamur og dugir at umstilla seg skjótt

**Vit bjóða:**
- Eitt mennandi arbeiði, har nógv er at gera
- Eitt arbeiðsumhvørvi, har pláss er fyri látri
- Vegleiðing
- Supervisión

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøki fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Stuðusskipanin fyri vaksin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Stuðulsskipanina á tlf. 354020 og tosa við Regin Johansen, leiðara ella við Odu M. Jóhansdóttir, varaleiðara.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Stílað: Regin Johansen, leiðara
Løkjatún 1
160 Argir

**Umsóknarfreist: 26. februar 2006.**


Sosialurin
www.sosialurin.fo


# Hjálparfólk

## til Barnaverndartænastuna í Suðuroy

Kundi tú hugsað tær at virkað og arbeitt fyri, at børn og ung í Suðuroy fáa tryggleika, umsorgan og ein tryggan uppvøkstur? Kanska átti tú tá at umhugsa at søkt arbeiði á Barnaverndartænastuni í Suðuroy.

Nú kommunurnar hava fingið ábyrgd av barnaverndini, hava vit á barnaverndartænastuni í Suðuroy brúk fyri einum fólki í fulltíðarstarvi ella 2 fólkum í hálvtíðarstarvi. Hesin/hesi skulu hjálpa okkum at bøta umstøður og kor hjá teimum, sum ikki hava nóg mennandi og tryggan barn- og ungdóm.

Vit vilja, at tú kanst taka við starvinum skjótast gjørligt.

Barnaverndarumsitingin, sum umboðar umleið 5000 suðringar, húsast í løtuni í býráðshúsinum á Tvøroyri. Fyribils fara 2 fólk at arbeiða har. Arbeiðið verður fjølbroytt og umfatar m.a. heimavitjanir, at ráðgeva børnum og/ella familjum teirra, at samstarva við og seta stuðlar í starv, sum skulu hjálpa og menna barnið í og uttanfyri heimið. Í arbeiðinum fert tú eisini at samstarva við nógvum fakfólkum m.a. innan heilsuverk, námsfrøði og sálarfrøði. Tú kemur at taka tær av nógvum ymiskum barnaverndarmálum - gomlum sum nýggjum - og virkisøkið okkara verður innan karmarnar av nýggju barnaverndarlógini.

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur hóskandi útbúgving (t.d. sosialráðgevi, lærari, pedagokur, (barna-)sjúkrasystir e.t.
- At tú hevur arbeiðsroyndir sum málsviðgeri í almennari umsiting og/ella hevur royndir frá barnaverndararbeiði.
- At tú ert fleksibul og hevur góð samstarvsevnir
- At tú ert ábyrgdarfull/ur, miðvís/ur og sjálvstøðug/ur í arbeiði tínum.
- At tú hevur gott innlit og evnar at síggja álvaran í teimum málum tú arbeiðir við.
- At tú ert nærverandi og hevur umsorgan fyri barnsins tørvi.

Innlit og royndir frá barnaverndararbeiði kann vera ein fyrimunur, men er ikki eitt krav.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði
- møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar
- møguleika fyri flekstíð og at arbeiða heima part av tíðini.

Lønin verður avtalað við støði í útbúgving og galdandi avtalum við fakfelag títt.

Meira fæst at vita frá Susanne Madsen á tlf. 371085 ella teldupost: susanne@tvoroyri.fo

Umsókn við relevantum viðheftum kunnu sendast til:

**Tvøroyrar Kommuna**
Postboks 80
FO-800 Tvøroyri
Mrk.: starv barnaverndarumsitingin

Freistin at søkja er: mánadagin tann 20. februar 2006. Skriva eisini, um tú ynskir at verða hálv- ella fulltíðarsett/ur.